**Tíðargreinin: eitt íkast til føroyska orðaskiftið**
Sosialurin hevur tíðargrein í blaðnum týsdag og hósdag
Hevur tú hug at gera títt íkast til føroyska kjakið í 2008?
Send eina grein til dorit@sosialurin.fo
Kravið er, at greinin er á leið 6000 tekn og skrivað í essay stíli

**Næstu ferð:**
Næsta tíðargreinin kemur týsdagin.
Rolf Guttesen, Hví stendur fólkatalið í stað?



# Føroysk eindarmentan er fortíð



TÍÐARGREININ
*Uni Arge, journalistur*

**Einaferð vóru øll oyru í Føroyum vend ímóti útvarpinum. Tað, sum útvarpið segði, var sannleiki. Tá sjónvarpið kom, fekk tað nærum eins sterka støðu. Alt, sum har var at síggja av føroyskum tilfari, mátti síggjast. Hendan tíðin er farin. Eindarmentanin á fjølmiðlaøkinum er deyð, og nýggjasta lurtarakanningin prógvar hetta. Fremsta uppgávan hjá kringvarpinum verður nú at sannføra lurtarar og hyggjarar um sín tilverurætt**

Nógv hevur verið tosað um Kringvarp Føroya í seinastuni. Undanfarna landsstýrið gjørdi av at leggja útvarpið og sjónvarpið saman, og undanfarni stjórin, Jógvan Jespersen, hevði onki annað val enn at royna at gera, sum landsstýrið vildi. Hann royndi at leggja stovnarnar saman, men gavst, tí hann helt uppgávuna vera vónleysa.

Nú hava so nýtt stýri og nýggjur stjóri tikið við, ið skulu føra samanleggingina á mál. Bygnaðurin skal broytast, so samanleggingin kann fáast at rigga, verður sagt.

Eg haldi, at øgiliga nógv hevur verið tosað um samanlegging, nýtt hús, bygnað, kringvarpsgjald og starvsfólkarøkt í seinastuni. Alt hetta eru viðurskifti, ið kunnu metast sum karmar um virksemið hjá kringvarpinum. At hava ein hóskandi bygnað, nóg mikið av pengum og nøgd starvsfólk eru neyðugar fortreytir fyri, at tað skal eydnast at skapa gott útvarp og sjónvarp. Men eg sakni eitt kjak um, hvat vit vilja við kringvarpinum í 2008. Hetta kjakið er neyðugt, tí støðan hjá kringvarpinum er grundleggjandi broytt seinnu árini.

**Tá útvarpið kom**
Upprunin til kringvarpið er Útvarp Føroya. Útvarpið varð stovnað í 1957 við tí endamáli at veita føroyingum føroyskt útvarp. Føroyingar høvdu møguleikan at fara undir at endursenda danskt útvarp, men av berum treiskni varð hetta tíbetur ongantíð gjørt. Føroyskt útvarp ella sløktan sendara, gjørdist meginreglan, og soleiðis mentist útvarpið. So hvørt sum orka at senda meira fekst til høldar, komu fleiri sendingar á skránna.

Við útvarpinum fingu føroyingar fyri fyrstu ferð ein fjølmiðil, sum rakk út í hvønn krók í landinum samstundis við somu tíðindum borin fram soleiðis, sum útvarpsmaðurin valdi at bera tey fram. Hetta gav útvarpsfólkum eina nærum óhoyrt sterka støðu í samfelagnum. Tá útvarpstíðindi vóru á døgurða, var manntómt í gøtunum, tí fólk lurtaðu. Sama støða var á nátturða. Fólk vildu vita, hvat útvarpið segði.

Útvarpið skapti á hendan hátt eitt slag av eindarmentan í Føroyum. Sum dømi kann nevnast, at V4-sendingarnar í sjeytiárunum gjørdust óvanliga væl umtóktar millum fólk, júst tí sendingarnar vóru einasta undirhaldið, fólk fingu. Føroyingar høvdu tá onki sjónvarp, ongar parabolir og onki internet, og tí vóru stjørnur føroyinga allar stjørnurnar í V4.

Men útvarpið vildi ikki bara undirhalda. Málið var eisini at vera mentanarmiðstøð í landinum. Útvarpið átók sær leiklutin at vera málsliga uppbyggjandi og innihaldsliga kveikjandi. Undir hesum málsetningi var ein sterk kensla av, at føroyska mentanarøkið er lítið og má røkjast. Útvarpsleikir vórðu tí spældir á føroyskum, útlendskar søgur lisnar á føroyskum, føroyskir sangir tiknir upp og spældir aftur og aftur, spennandi ítróttarfrásagnir skaptar, aktuellar sendingar sóu heimin úr føroyskum sjónarhorni, siglt varð kring oyggjarnar at greiða frá landinum o.s.fr.

Av nærlagni og vilja til at bróta upp úr nýggjum fekk útvarpsarbeiði ein sterkan dám av at vera listhandverk, um tað so snúði seg um málsligt hegni, hegni at siga frá ella evnini at skapa fyndugt innihald og undirhald. Fólk vandu seg á hendan hátt við frálíkar upplesarar, frásøgumenn, týðarar, skribentar, tíðindamenn, yrkjarar, tónleikarar, sangarar, sjónleikarar og skemtarar. Øll eru tey mangan nevnd og tí eisini kend.

**Tá sjónvarpið kom**
Útvarpið var einsamallur loftmiðil frá 1957 til 1978, tá fyrstu sjónvarpsfeløgini fóru at senda. At síggja sjónvarp fyrstu árini var sera forkunnugt. Enn í dag munnu mong minnast til dømis sendirøðina um Colorado-søguna, ið rúnarbant mangan hyggjara, hóast hon neyvan nyttaði serliga nógv. Tá so Dallas og Dollars komu á skíggjan, vóru føroyingar seldir, og tey flestu gloymdu alt um fiskaprísir, politikk og kanska eisini vanligt fíggjarligt skil.

Sterkastu ávirkanina í sjónvarpinum høvdu tó føroysku sendingarnar. Eftir at Sjónvarp Føroya var komið í 1984, og danska TV-avísin hevði tapt dystin ímóti nýggju føroysku tíðindasendingini, Degi & Viku, kundi ongantíð vendast aftur til donsk tíðindi. Føroysku sjónvarpstíðindini vóru ein stórhending, hvørja ferð tey vórðu send, og tað vóru allar hinar føroysku sendingarnar eisini. Var tað føroyskt, mátti tað síggjast.

Ávirkanin, sum sjónvarpið fekk, kann sammetast við ávirkanina, sum útvarpið hevði fyrstu mongu árini. Sendingarnar vóru felagshendingar fyri alla tjóðina. Kanningar hava onkuntíð víst, at 80 prosent av fólkinum hugdu at Degi & Viku. Eg ivist ikki í, at sama høga tal á hyggjarum hugdi, tá t.d. undirhaldssendingin Kjørbreyt var á skránni, tá sjónvarpsfólk fóru til fjals, ella tá avdúkandi sendingar tóku í herðatoppin á landsins politikarum og stjórum.

Men soleiðis er ikki longur, og tað veit eg av royndum. Sjálvur var eg í starvsvenjing í sjónvarpinum frá 1996 til 1998, har eg eitt nú gjørdi tíðindi og mentanarsendingar. Eg hevði ikki verið í sjónvarpinum í meira enn 2-3 vikur, so visti hvør einasti av øllum teimum, eg hitti, at eg arbeiddi í sjónvarpinum. Tá eg í 2004 aftur var í sjónvarpinum og hevði arbeitt har í 15 mánaðir, kundu fólk framvegis spyrja, hvat eg nú gjørdi, tí tey vistu tað ikki.

Hví vistu tey tað ikki? Mín niðurstøða var, at sjónvarpið hevur mist evnini at rúnarbinda fjøldina, og at fólk hyggja nógv minni at føroyska sjónvarpinum nú enn fyrr. At útvarpið er í ferð við at fáa somu lagnu, er nýggjasta Gallup-kanningin um útvarpsvanar eitt talandi prógv um. At bara ein triðingur av øllum føroyingum yvir 15 ár lurtar eftir tíðindunum á døgurða og nátturða, sigur mær, at eindarmentanin á fjølmiðlaøkinum er deyð, tí fyrr hava 60-70 prosent av fólkinum lurtað somu tíðir á degnum.

**Hvat so nú**
Men hví er so vorðið, kunnu vit spyrja. Ein orsøk er, at loftmiðlamonopolið varð avtikið í 1998, og at aðrar útvarpsrásir eru farnar at kappast við útvarpið. Ein onnur orsøk er, at fylgisveinar hava altjóðagjørt hvørt einasta føroyskt heim við tíggjutals útlendskum sjónvarpsrásum. Ein triðja orsøk er, at ungdómurin við internetinum hevur fingið ein miðil, hann aldrin fer at sleppa aftur.

Kunnu vit við hesum í huga so siga, at Kringvarp Føroya hevur útspælt sín leiklut? Mítt svar er avgjørt noktandi. Men eg haldi, tað hevur gingið ógvuliga striltið hjá kringvarpinum at orða, hvør tess leiklutur skal vera undir teimum nýggju umstøðunum. Eins og ein fyritøka støðugt má spyrja seg sjálva, hví hon er til, og hvagar hon fer, má Kringvarp Føroya spyrja, hví tað yvirhøvur sendir, og hvør tess tilverurættur er - í dag.

Kringvarp Føroya er einastandandi, tí tað sum einasti fjølmiðil í heiminum hevur fingið álagt at framleiða føroyskar sendingar. Men mitt í eini tíð, har støðan hjá kringvarpinum viknar, tykist kringvarpið innihaldsliga at vera vorðið ógvuliga nógv ávirkað av skjótleikanum og lættisoppakenda tilfarinum, sum floymir úr júst fylgisveinum og interneti. Í staðin fyri at framleiða umhugsað og tilvitað tilfar verður nógv meira snakkað um leyst og fast í dag enn fyrr. Útvarpsarbeiði er við fáum undantøkum ikki listhandverk longur.

Hetta er skeiv leið at fara, tí sum einasti stovnur á klótuni skal Kringvarp Føroya jú prógva, at tað ber til at framleiða føroyskt loftmiðlatilfar við fynd, innihaldi og dygd, og hendan uppgávan má takast í álvara, skulu vit ikki gerast mentanarliga og innihaldsliga líkasæl. Tí eigur kringvarpið støðugt at uppfinna og framleiða dygdarsendingar, ið síggja samfelagið og heimin úr einum føroyskum sjónarhorni og umrøða lív, mentan og kenslur á føroyskum máli. Og ikki bara tað. Kringvarpið má lýsa við sendingunum, tí í dag er jú ikki sjálvsagt, at føroyingar lurta og hyggja at føroyskum sendingum.

Kringvarpið eigur haraftrat at fara at brúka møguleikarnar á internetinum til fulnar og breiða út alt sítt stóra bandasavn til føroyingar heima sum uttanlands. Leggið alt savnið í Sortudíki og Vørðsluni út á netið, alt frá Dánjali í Klingruni til landsdystin í Landskrona. Fyllið cyperspace við mentanarskattinum, sum er skaptur síðan 1957, so hesin skatturin ikki varð skaptur til fánýtis, tí tíðin er so vorðin í dag, at tað, sum ikki finst á netinum, er í veruleikanum ikki til.

Á hendan hátt kann Kringvarp Føroya fara at standa sum ein mentanarligur Rockall í andligu altjóðagerðini. Ein klettur tilvitaður um sín tilverurætt og errin av, at hann megnar at vera fremsta umboð í heiminum fyri eina lítla mentan og eitt lítið mál, sum noktaði at doyggja, men livir í besta blóma og støðugt mennir seg.



*Kringvarp Føroya er einastandandi, tí tað sum einasti fjølmiðil í heiminum hevur fingið álagt at framleiða føroyskar sendingar*

Tíðargreinin